Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Rætturin til býli offur fyri vantandi politikki

Oddagrein

Íbúðapolitikkur í Føroyum finst bara í orði og lítið og einki í verki. Kortini eru nøkur ávegis stig framd at reka einíbúðapolitikk, sum Íbúðagrunnurin er eitt dømi um. Men higartil hevur einki landsstýri sett sær fyri at reka ein veruligan íbúðapolitikk.

Politiski viljin hevur ikki rokkið til at gera annað enn at fella nøkur føgur orð í stevnuskráir. Onkur lógin er samtykt, og harafturat er onkur lítil játtan komin á fíggjarlógina. Lítið annað hava vit sæð. Tískil hava vit nærmast anarki - lógloysi - tá tað snýr seg um mannarættin at hava eitt býli.

Eitt dømi er, at vit hava ikki nakra veruliga lóg, sum tryggjar leigarar. Leiguógin, sum er frá 1940, er alt annað enn tiðarhóskandi. Harafturat hevur bara Tórshavnar kommuna sett hana í gildi. Útleigarin hevur allan rættin og leigarin ongan. Útleigarin kann seta eina leigu upp, og kann leigarin ikki gjalda, so verður hann varpaður út. Uttan nakað tryggjað skoðbrá. Leiguíbúðir skulu ikki góðkennast, og einki eftirlit er við, um leiguinntøka verður uppgivin til skattamyndugleikan.

Eitt annað dømi er prísurin á húsum, søla og vinningur fyri sølu. Nógv dømi eru um, at menn hava keypt bílig hús í kreppuárunum. Ídag verða hesi hús seld fyri eina milliín og meiri. Men vinningurin er skattafríur. Vit hava ikki kapitalvinningsskatt í Føroyum og harafturat hava vit ikki húsametingar, sum onnur lond hava, og sum kunnu áseta ein mestaprís.

Í eini útvarpssending hoyrdu vit nú ein dagin, at fleiri familjur høvdu keypt sær hús í Nolsoy, tí tey vóru meiri enn helvtina bíligari enn í høvuðsstaðnum. Tað er sjálvandi at fegnast um, at fólk búsetast á bygd, men samstundis sigur tað nakað um, at tað er nakað heilt galið, at hús í Havnini kosta bæði 1,2 - 1,3 ella 1,4 millión krónur at keypa ella byggja. So nú er gulltíð hjá teimum, sum vilja selja, ella hjá teimum, sum hava spekulerað í kreppuni.

Ofta varð sagt, at »mjørkadalsmenninir« vóru atvoldin til, at leigu- og húsaprísurin ruku upp um 1960, tá støðin í Mjørkadali varð bygd. Nakað var helst um tað. Men nú stendur ein onnur vinna og pikkar á dyrnar. Bara í leitingarskeiðnum hava oljufeløg brúk fyri íbúðum. Og kemur tað til eitt framleiðsluskeið, kann hugsast, at gravgangur veður eftir býli. Hvør verður við sviðusoð tá? Jú, vanligi føroyingurin. Og serliga tann minni menti, ungar familjur, sum savna pening at byggja fyri, og pensjónistar. Álvaratos, tit sum varða av hesum øki, takið tykkum saman! Viðgerið støðuna og fremjið ein íbúðapolitikk í verki! Vit kunnu ikki siga, at vit hava eitt vælferðarsamfelag, tá eitt so týdningarmikið økið er offur fyri mannavondum marknaðarkreftunum.

Sosialurin

Viðmerking:

Hamarin, tann gloymdi býarparturin í Tórshavnar Kommunu

Hamarin á Argjum eigur ongan góðan í Tórshavnar Býráð. Tað kann trívast í sera nógv, sum mangar og ikki verður gjørt. Men eitt er,ið er ovboðið og sum vit hamarsbúgvar ikki tolerera longur, er vegurin niðan frá Fíggjarmálastýrinum og niðan á Hamaran.

Vegurin er so vánaligur, at næstan ikki er koyrandi við vanligum bili. Bílarnir verða sundurliðaðir, fjaðrasystem, perur o.a. má skiftast við jøvnum millumbili og hetta kann býráðið ikki bjóða sínum borgarum, sum gjalda fullan skat. Tað eru nógvir hamarsbúgvar,ið ferð eftir ferð hava roynt at fingið býráðið at lagt um ikki annað eitt lag av asfalti á vegin, men tað er sum at sletta vatn á gás.

Tórshavnar Kommuna vísir á, at byggjaríið á Hamaranum ikki er liðugt? Tey fyrstu húsini komu fyri uml. 7-8 árum síðani, og skal bíðast kanska í eini 10-12 ár afturat, til byggjaríið er komið undir land, kann ikki vera meiningin, og er ein háðan móti okkum,ið hava sett búgv í Tórshavnar Kommunu.

So ein áheitan á Tórshavnar Kommunu, fáið asfalt á vegin niðan á Hamaran, tí í verandi løtu er hetta ótolandi.

Tað er nokk einki at ivast í, nú býráðsval verður í november, at gull og grønar skógir verður lovað í eyst og vest, tað gjørdi Leivur Hansen fyri 4 árum síðani, tá lovaði hann at útjaðarin skuldi ikki verða gloymdur – men á Hamaranum á Arjum eru vit gloymd og eingin í Tórshavnar Býráð leggur nakað í okkum, líkamikið hvussu vit royna at heita á býráðið.

ps.
Tit býráðslimir, tit skuldu roynt at koyrt nakrar ferðir um dagin niðan og oman – tað gera vit sum eiga børn og hini eisini – upp til 8-10 ferðir um dagin, vit hava jú ongan buss sum børnini kunnu nýta.

Vinarliga,
Hans Andreasen

Sól og summar á gøtusandi

Hugnaløta fyri stór og smá

Ponyríðing, framsýning, fjallarenning, togtogan, køkuuppboðssøla, undirhald, ellisakfør, kórsangur, røða, bál og konsert við Sámal Ravnsfjall og Ronnie Nielsen. Hetta er nakað av tí,ið verður á sandinum í Syðrugøtu leygardagin

Leygardagin skipar Gøtu Menningarflelag fyri hugnaløtu við stórum báli og øðrum spennandi

Viðrar, skipar Gøtu Menningarfelag leygardagin 24. juni fyri tí vælumtóktu hugnaløtuni við stórum báli og nógvum øðrum spennandi tiltøkum á sandinum í Syðrugøtu.

Byrjað verður longu kl. 14 við at børn sleppa at sita á rossabaki. Eisini verður fiskibrunnur og køku/mattombola.

Kl. 15.30 byrjar Fjallarenningin. Hetta er kapping,ið fyrstu ferð var roynd í fjør við góðum úrsliti. Kappast verður um at renna /ganga niðan á Støðlafjall og oman aftur upp á tíð. Tríggir teir skjótastu luttakararnir fáa steyp til ognar, og vinnarin fær eisini stórt og vakurt ferðasteyp. Byrjað verður á Gøtueiði, og málstrikan er á sjálvum sandinum í Syðrugøtu. Øll,ið hug hava, kunnu taka lut í kappingini og tekning fer fram á tlf. 441484 ella á 442026. Meðan runnið verður, verður stór framsýning á økinum við sandin av politi-, sløkkiliðs- og sjukrabilum. Eisini verður framsýning av ellisakførum á økinum við sandin.

Kl. 16.30 er togtogan millum ung, konur og menn úr Syðrugøtu og Norðragøtu á skránni. Her verður kappast um ferðasteyp.

Uppboðssølan av køkum byrjar kl. 17.30. Seldar verða flottar og vælsmakkandi køkur í øllum møguligum útgávum.

Eftir køkuuppboðssøluna verður ymiskt undirhald á skránni. Ongum nýtist heldur at ganga svangur á sandinum, tí umframt pylsur og sodavatn, verður eisini kaffi og køka at fáa.

Kl. 18.30 fer felagskórið Gøta/Leirvík at syngja og Tórbjørn Jacobsen, skipari á Glyvrum,ið hevur rætur í Gøtu, fer at halda røðu. Tórbjørn er kendur røðari, so helst fellur okkurt gullkorn á sandin leygardagin.

Kl. 19.00 verður kynt í tað stóra bálið á sandinum, og tá verður eisini felagssangur. Heitt verður í hesum sambandi á fólk um at hava grønu sangbók við.

Kl. 20 verður ókeypis konsert á sandinum, har teir báðir Sámal Ravnsfjall og Ronnie Nielsen í einar tveir tímar fara at framføra meira og minni kendar vísur og sangir. Á midnátt verður konsert/dansur í skúlagarðinum, har »Mr Jolly's Fluffy Toys« og »Pith« fára at spæla. Hesum táttinum standa tónleikafelagið GRÓT og Menningarfelagið fyri í felag. Opið verður í Menningarfelagnum, meðan dansur er.

Gøtu Menningarfelag væntar, at tað fara at koma eins nógv fólk sum undanfarin ár, tí hetta tiltakið er vorðið fastur táttur í summarhugnanum hjá smáum og stórum eysturoyingum og eisini nógvum fólkum aðrastaðni frá.

Óneyðugt er helst at nevna, at tað sjálvandi er ókeypis at koma á Gøtusand leygardagin.

So sjálvandi síggjast vit í Gøtu leygardagin!!!

Gøtu Menningarfelag

Atlantsflog bjóðar bíligar ferðir til Europa

Atlantic Airways bjóðar í summar (frá 1. juli til 20. august 2000) bílig tilboð til seks europeiskar stórbýir. Býirnir eru Madrid, Malaga, Rom, Stockholm, Paris og London. Prísirnir eru stak bíligir – úr 2.585 DKK upp í 2.995 DKK fyri hvønn ferðandi. Afturat hesum prísinum skulu leggjast skattir og avgjøld.

Ferðatilboðini umfata flúgving við Atlantic Airways til Keypmannahavnar, Glasgow ella Aberdeen og víðari við SAS ella British

Airways.

Avmarkandi treytir eru kortini við hesum stak bíligu ferðum. Eitt nú skulu í minsta lagi tvey ferðast saman, og ferðaseðlarnir skulu keypast í seinasta lagi 7 dagar fyri fráferð.

»Hóast vit leggja størsta dentin á at menna beinleiðis ferðasambandið til grannalondini, so vilja vit eisini bjóða føroyingum kappingarførar ferðamøguleikar víðari út í heim«, sigur Magni Arge, stjóri. »Tað er ongin ivi um, at vit eisini frameftir fara at menna ferðatilboðini, eins og vit hava gjørt seinastu árini, men kortini skal hetta gerast við búskaparligum skili«, sigur hann.

Flestu av hesum ferðatilboðum eru umvegis Keypmannahavn, men eitt nú London slepst eisini til umvegis Glasgow og Aberdeen. Í summar flýgur Atlantic Airways tvær ferðir dagliga til Keypmannahavnar og tríggjar ferðir um vikuna til Skotlands.

Umframt hesi tilboð bjóðar Atlantic Airways eisini eina rød av ferðatilboðum til Danmarkar, Noregs, Skotlands, Íslands, Grønlands og USA.

Ferðatilboðini kunnu bíleggjast hjá øllum ferðaskrivstovum í Føroyum.

Fyritøkur egnan barnagar›

Er barni› skrásett í kommununi, rindar Tórshavnar B‡rá› 70 prosent av rakstrinum, um stovnar og fyritøkur seta á stovn barnagar› ella vøggustovu. Treytin er, at lógin um dagstovnar og dagrøkt ver›ur fylgd



N‡ggja lógin um dagstovnar og dagrøkt gevur fyritøkum og stovnum í Tórshavnar kommunu møguleikan at ansa børnunum hjá starvsfólkunum

DIA MIDJORD

Ta› er ein fyrispurningur frá Føroya Tele at stovnseta barnagar› og vøggustovu til børn hjá starvsfólkunum, i› hevur fingi› Tórshavnar B‡rá› at royna n‡ggjar lei›ir á barnaansingarøkinum. N‡ggja lógin heimilar eisini hesum.

Á b‡rá›sfundi mikukvøldi› heilsa›i eitt samt b‡rá› uppskotinum vælkomnum og játta›i at rinda 70 prosent fyri hvørt barni›, i› er tilmelda› Tórshavnar kommunu. Men fyritøkan má gjalda allan fløgu- og vi›líkahaldskostna›in. Í svarinum til Føroya Tele stendur eisini, at kommunan vil rá›a yvir plássunum, i› fyritøkan ikki n‡tir.

Kann stytta bí›ilistan

Elin Lindenskov, forma›ur í sosialu nevnd hjá Tórshavnar kommunu, fegnast um, at vinnulívi› hjálpir til at fáa stytt um langa bí›ilistan, sum eftir summarfríti›ina telir 289 børn. Sama ger b‡rá›sforma›urin Leivur Hansen.

– Stø›an er ikki gó› í løtuni. Okkara mál er, at øll arbei›sfør í kommununi skulu sleppa til arbei›is og eiga ikki at setast aftur, tí trot er á barnaansing, sigur Leivur Hansen.

Hann fegnast um útspæli› frá Føroya Tele og vónar, at fleiri a›rar fyritøkur fara at ganga í teirra fótasporum.

– Hetta er eitt tiltak, sum allir partar fáa gle›i av, sigur hann.

Fyri at tryggja seg móti misbrúki av skipanini, skal b‡rá›i› gó›kenna sjálva rakstrarfíggjarætlanina hjá fyritøkuni, á›renn peningur ver›ur játta›ur.

– Og vit skulu eisini hava vissu fyri, at talan er um børn, i› skrásett eru hjá okkum, sigur Leivur Hansen.

Kollfir›ingar fáa Rás Tórshavn

Tórshavnar B‡rá› hevur samtykt at seta upp eina móttøkustø› á Kjalnesi, so kollfir›ingar kunnu njóta somu rættindi sum a›rir borgarar í kommununi

DIA MIDJORD

Allir borgarar í Tórshavnar Kommunu skulu hava somu rættindi og somu skyldur. Hetta er útgangsstø›i fyri samtyktini at játta pening til eina móttøkustø› á Kjalnesi. Tórshavnar B‡rá› hevur sett av eina millión á fløguætlanini fyrr í ár, og mikukvøldi› samtykti b‡rá›i› at veita á lei› eina millión aftrat, sum írestar at gera móttøkustø›ina av fylgissveinasignali lidna.

B‡rá›sforma›urin heldur ikki, at hetta er nógvur peningur og skilir ikki tey fólk, i› gremja seg um íløgurnar, sum gerast skulu í Kollafir›i.

– Vit hava bundi› okkum í avtaluni vi› Kollfir›ingar at veita teimum somu tænastur, i› allir a›rir borgarar í kommununi fáa. Vit skulu minnast til, at vit fáa einar 16 ella 17 milliónir inn í kassan, tá samanleggingin gerst veruleiki á n‡ggjarinum, sigur hann.

– Vit gerast størri, sterkari og ikki minst ríkari, um vit síggja samanleggingina upp á longri sikt, sigur Leivur Hansen.

Men ta› eru ikki allir partar í høvu›ssta›num, i› hava hesa tænastu, i› kollfir›ingar nú fáa?

– Nei, ta› er rætt. Men vit arbei›a alla tí›ina vi› at betra um hesi vi›urskifti hjá øllum, i› hoyra til Tórshavnar kommunu. Men vit hava bundi› okkum í avtaluni vi› kollfir›ingar, og tí mugu vit ra›festa hesa tænastu ovarlaga, sigur Leivur Hansen.

Minnisrík tónleikafer›

– Ta› kendist sum ein lastbilur fór buldrandi framvi›. Hetta sigur Axel H. Nolsøe, i› saman vi› føroyskum tónleikanæmingum var í Reykjavík, tá jør›in brádliga fór at skelva

Tær tríggjar 10 ára gomlu føroysku genturnar lógu stillar á eini grasfløtu í íslendska høvu›ssta›num og hugdu eftir sjónleiki, tá jør›in brádliga fór at gera um seg í nøkur sekund.

– Ta› kendist sum ein stórur lastbilur fór buldrandi framvi›, sigur Axel H. Nolsøe, pápi at einu gentuni.

Hetta var á sjálvum tjó›ardegnum 17. juni. F‡ra dagar seinni vóru aftur ristingar á Su›urlandinum.

– Hesa seinnu fer›ina var jar›skjálvtin um náttina, og vit lógu øll og svóvu. Eingin vakna›i, og vit varna›ust fyrst jar›skjálvtan, tá vit morgunin eftir horydu tí›indini.

Hvussu upplivdu genturnar, Hei›a, Turi› og Helena, at jør›in fór at skelva?

– Eg haldi ikki, at tær rei›iliga vistu, hvat ta› var sum hendi. Men tær gjørdust eitt sindur bilsnar, tá jør›in livdi í nøkur sekund. Men onnur fólk á sta›num tóku ta› heilt róliga, og ta› gjørdu vit eisini, sigur Axel.

Á Suzuki-stevnu

Tær tríggjar hava saman vi› foreldrunum veri› á tónleikafer› í Íslandi. Í Reykjavík liggur ein tónleikaskúli, i› arbei›ir eftir Suzuki-skipanini. Og føroyingarnir vóru bjó›a›ir at luttaka á árligu Suzuki-stevnuni.

– Í Íslandi hava tey sera gó›ar umstø›ur, og okkara børn fingu eitt tónleikaligt upplivilsi, sigur Axel H. Nolsøe.

At føroyska fer›alagi› eisini upplivdi tveir jar›skjálvtar á túrinum.

– Ja, ta› tóku vit bara sum enn eitt upplivilsi, sigur Axel H. Nolsøe.

DIA

Bilpakkar summarið 2000
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
4 fólk í bili
Danmark
Fráf. Tórshavn 1/9 8/9
Fráf. Hanstholm 17/6 19/8 26/8 2/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hanstholm ella hinvegin
úr 775,- fyri hvønn
Noreg
Ferðist bíliga, Tórshavn-Bergen ella hinvegin
úr 480,- fyri hvønn
Hetland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Lerwick ella hinvegin
úr 385,- fyri hvønn
Ísland
Fráf. Tórshavn 21/6 9/8 16/8 23/8 30/8
Fráf. Seyðisfjørður 22/6 24/8 31/8 7/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Seyðisfjørður ella hinvegin
úr 728,- fyri hvønn
Skotland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hetland-Skotland ella hinvegin
úr 1.273,- fyri hvønn
e-mail: booking@smyril-line.fo